# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Symfoniorkestrið 25 ár

Føroya Symfoniorkestur er 25 ár og hetta verður sjálvsagt hátíðarhildið á hóskandi hátt. Klassiskur tónleikur hevur, hóast hann ikki í søguligum høpi kann sigast at hava havt breiða fólksliga undirtøku í Føroyum, rættiliga djúpar røtur í Føroyum. Svabo bæði spældi og skrivaði klassiskan tónleik, Bakar Hansen var tikin úr leikum og aldi upp eitt dugnaligt lið av tónleikarum, sum royndu seg við alskins ljóðførum. Hesir vóru teir tiltiknu Glaðu Spælimenninir, sum William Heinesen gav ódeyðiligkleika við síni heimsgitnu skaldsøgu við sama heiti. Eldri Havnafólku kunnu meira enn so seta  nøvn á hesar spælimenn, ið komu úr ávísum stak musikalskum ættum í høvuðsstaðnum. Ein teirra, tann klóki og mentaði humanisturin Maurentius Viðstein, var enntá fyrsti blaðstjóri á blaði okkara, sum tá nevndis Føroya Sosialdemokratur. Ein bróður Williams, gjørdist limur í Kongaliga kapellinum og varð víðagitin sum klarinettleikari. Sum leiðarin á Tórshavnar Musikkskúla vísir á í fráleikari gein í blaðnum í gjár, so byrjaði Erik Petersen, cand. mag. í donskum og tónlist at undirvísa í klassiskum tónleiki í 1942 og hetta virksemið leiddi til frálíkt kamarorkestur, Tórshavnar Musikkskúli, ið var virkið í mong ár.

Við undantøkum kom alt hetta yvir tónleikavirksemið, hóast sera dygdargott, undir tað, sum í dag nevnist áhugatónleikur. Hetta broyttist, tá almenna Musikkskúlaskipanin varð sett á stovn í 1983. Við Musikkskúlaskipanini varð støðið lagt undir eitt yrkisligt klassiskt tónlistalív í Føroyum. Tað er væl ikki ov nógv sagt, at Føroya Symfoniorkstur er sprottið úr Musikkskúlaskipanini við tað, at leiðarin Ólavur Hátún fór at seta yrkisútbúgvnar lærarar við skúlan. Men so skal sjálvandi eisini verða nevnt, at formaður symfoniorkesturins í mong ár, Alex Sólstein, í síni tíð var íðin fiólleikari í gamla Tórshavnar Musikkskúla og sama er at siga um fleiri av eldru tónleikarunum í symfoniorksetrinum. Tað er soleiðis mongum dugnaligum eldsálum fyri at takka, at vit í dag hava egið symfoniorksetur. Føroya Symfoniorkstur hevur í dag breiða undirtøku í fólkinum. Her leika nógv ung yrkislærd og sera gávurík tónlistafólk, og tað er ein frægd at lýða á hetta orkestur, tá framførsla er. Við núverandi dirigentinum Berhardi Wilkinsson, ið er av føroyskari ætt, hevur Føroya Symfoniorkestur fingið topprofessionellan leiðari, víðagitin í altjóða høpi og hartil ein eldsál av tí rætta slagnum. Symfoniorkestrið er tónlistarliga á veg uppeftir, og føroyingar eiga nógvar og ríkar tónlistaupplivingar í væntu. Tað er tí at vóna, at landsins myndugleikar duga at virðsmeta hetta og tryggja orkstrinum tær fíggjarligu umstøður, sum slíkur stovnur hevur uppiborið.

**Sosialurin**

## Føroya Symfoniorkestur farið um tey tjúgufimm

**ÓLAVUR HÁTÚN**



Hjá kamarorkestrinum Tórshavnar Musikkskúli, sum frá sínari byrjan tíðliga í 40-árunum við ídni og áhaldni hevði veitt havnarborgarum høvi til reguliga at hoyra klassiskt samanspæl, vóru 60-árini ein serlig menningartíð - hetta ikki minst tí musiska og sprækna ríkisumboðsmanninum Mogens Wahl fyri at takka. Sum týðandi nevndarlimur í Dansk-Færøsk Kulturfond og við sínum sambandi bæði við danskar stuðulsstovnar og við tónleikalívið í Keypmannahavn fekk hann veitt orkestrinum fíggjarligan førleika  og tónleikalig hugskot til listarligan íblástur frá dugnaligum orkesturleiðarum uttanífrá.

Framhaldandi vóru tað strúkarnir, sum bóru aðalinnihaldið, men eftir umstøðum, sum tá vóru – ein lækni í býnum var hollur floytuspælari, danskur starvsmaður á posthúsinum kundi at handfara tað klassiska hornið, amerikumaður í Mjørkadali spældi upp á fagott, og messingblásarar vóru tøkir úr hornorkestrum í býnum –, bar nú eisini til í ávísan mun at framføra symfoniskan tónleik.

Ynski og tos um eitt føroyskt symfoniorkestur tóku seg nú upp. “Hatta skulu tit ikki droyma um”, helt tó danski tónlistamaðurin Hakon Elmer fyri, sum eitt skifti var leiðari hjá okkara kamarorkestri, og sum sjálvur hevði stovnað Sønderjysk Symfoniorkester og verið leiðari tess í fleiri ár. Okkara fámenta oyggjaland kundi ikki muna sum uppland til eitt fullborið symfoniorkestur, helt hann uppá; men eg vildi ikki geva honum viðhald. Fingu vit bert høvi til at gróðurseta eitt so fjølbroytt og framkomið tónleikalív í Føroyum, sum gávur vóru til í okkara ungdómi, mundi eisini fara og røkka til eitt slíkt ljómlið.

Í blaðsamrøðu seinni í sambandi við sanglæraraskeið – hugsi, tað var í Dagblaðnum – bar til at taka fram, at fingu vit í lag eina breiða musikkskúlaskipan við professionellum musikklærarun, fóru teir at verða besta grundstøði undir tí symfoniorkestri, sum talað hevði verið um, og sum eisini bretski orkesturleiðarin Hugh Watkins royndi at taka stig til.

Og so væl fall í lag, at longu annað árið hjá Royndarmusikkskúlanum komu danin Kanny Sambleben og norðmaðurin Magne Synnevåg í tætt samstarv sum musikklærarar bæði Havn og í Fuglafirði. Báðir vóru teir drivnir orkesturmusikarar – Kanny sum leiðandi fiólleikari í Sjællands Symfoniorkester og Magne sum klarinettistur í Bærum Symfoniorkestri -, og á teirra ferðum saman yvir dalar og fjøll tók seg nú upp hugskotið um at savna lærarar og framkomnar næmingar í musikkskúlanum til symfoniskt samanspæl. Og stór var løtan og fegnir áhoyrarar, tá vit á fyrsta sinni upplivdu okkara egna symfoniorkestur á konsert í nýggja Norðurlandahúsinum 19. juni 1983.



Fjórðingsøld er nú farin aftur um bak hjá hesum okkara flaggskipi í tónleikaheiminum, og mangar ríkar løtur hevur tað veitt okkum frá sínari varisligu byrjan til stórmenningina serliga hesi seinastu árini, nú alt fleiri gávurík ungmenni úr musikkskúlanum saman við eldri og nýútbúnum musikklærarum manna orkestrið, og tónleikari av slíkum formati sum Bernharður Wilkinson leggur sál og kreftir í leiðsluna. Benny er úr góðum bergi brotin, hálvur sumbingur í móðurlegg og pápin m.a. leiðari av tí navnframa kórinum BBC Singers í London. Sjálvur var Benny kórdrongur í teirri gitnu dómkirkjuni Westminster Abbey og hevur soleiðis umframt sín framúr førleika á tvørfloytuni eisini fingið kórsangin í seg frá barnaárum. Tað var tí so lagamanni, at hann eftir royndir við slíkum í Reykjavík tók stig til eitt sokallað symfoniskt kór til samstarv við symfoniorkestrið. Viðgangast má, at vit, sum í nøkur ár hava strembast við slíkum, ongantíð fingu ynskiligt samstarv í lag við orkestrið sum so; men tað er framtíðin, sum telur, og tað er tí at ynskja eftir, at hetta breiða virksemi við framførslu av stórverkum fyri eyga, lagt soleiðis til rættis, at tað ikki nervar annað kórarbeiði, framhaldandi fer at skapa ríkandi hæddarløtur í okkara tónleikalívi.

## Takk Sjúrður, men enn er tað ein gáta

**ROLF GUTTESEN**



Nú hevur Sjúrður Skaale, varamaður í Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, svarað greitt og heiðurligt, at hann ikki hevur lagt nakað trýst á Sosialin, fyri at fáa teir at geva eina umbering til nevnda Norðuratlantsbólk.

Men eg fái meg ikki at trúgva, at blaðstjórnin av sínum eintingum fer at blaða í gomul bløð (3 vikur aftur?), fyri at kontrollera um okkurt óheppið orðaval skuldi verið komið fyri.

Men nú er so greitt, at tað ikki er varamaðurin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax  341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.